# Góður fiskiskapur og positivar framtíðarætlanir

**Roc Amadour lá mikudagin á Vági og landaði. Eftir bert einar 5 dagar úti, kom Roc Amadour aftur til lands við eini 2600 kassum**

FISKIVINNA
*Dagfinn Olsen*

**Vágur:** Roc Amadour gjørdi ikki drúgvan túr hesaferð. Men túrurin var góður. Eftir bert einar 5 dagar úti, kom Roc Amadour aftur til lands. Menninir aftanfyri Roc Amadour hava eisini ætlanir um at keypa eitt skip afturat til Vágs, tí fiskiloyvi hava teir á hondum, ið bert bíðar eftir at blíva brúkt.

Mikudagin varð landað í kavarokinum og mett var, at skipið hevði eini 2600 kassar. Talan er um upsa og nakað av hýsu.

Nú er nakað síðani, at vágbingar keyptu Roc Amadour. Heri Godtfred, skipari, sigur, at hesa tíðina hava teir havt ymsar trupulleikar at dragast við. Ein aksil er brotnaður hjá teimum og eisini fór ljósmoturin.

### Nýtt skip til Vágs

Tað var Helgi Augustinussen, saman við brøðrum, ið keypti Roc Amadour til Vágs.

Eisini eiga teir annað fiskiloyvi og hava fleiri ferðir havt ætlanir um keyp av fiskifari. Millum annað hava teir verið í Íslandi og hugt at skipi. Men í løtuni heldur Helgi støðg í reiðaravirkseminum og hevur latið yngri kreftir taka við.

Hann sigur, at sera stórur áhugi hevur verið vístur fyri at keypa fiskiloyvið, ið teir eiga. Tilboðini eru komin úr øllum Føroyum.

Men teir hava ikki vilja selt og hava lagt dent á, at loyvið skal ikki av bygdini.

- Eg havi ikki viljað latið loyvið, hóast mongu tilboðini. Tað skuldi ikki av bygdini. Nú hava Heri Godtfred og aðrir fingið loyvið og tað vóru vit brøðurnir samdir um at gera, so loyvið fór ikki av fjørðinum, sigur Helgi Augustinussen.



Heri Godtfred sigur, at enn er einki ítøkiligt meira at siga um hetta, tí nú verður arbeitt víðari við hesum.

Men greitt er sostatt, at vágbingar í næstum kunnu vænta nýtt fiskifar at stevna inn á Vágsfjørð.

# Tunnil undir Leirvíkar bygd

**Í sambandi við gerð av undirsjóvartunli til Klaksvíkar, leggur bygdarráðið í Leirvík áherðslu á, at tunnil verður gjørdur undir Leirvíkar bygd, so ferðslan til Norðoyggjar ikki á nakran hátt nervar bygdina**

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Eirikur Lindenskov*

**Leirvík:** Á bygdarráðsfundi í Leirvík mikukvøldið varð samtykt gjørd um farleiðina í sambandi við undirsjóvartunnilin til Norðoyggjar.

Bygdarráðið sær tað sum eitt stórt framstig at partafelag nú er stovnað við tí endamáli at skipa fyri føstum sambandi millum Norðoyggjar og Eysturoy, og at tunnilin er alneyðugur fyri menningina av økjunum.

– Fast samband um Leirvíksfjørð og farleiðin um Leirvík hoyra óloysiliga saman og eigur á ongan hátt at verða til ampa fyri bygdina, sigur bygdarráðið í tíðindaskrvi.

Leirvíkar Bydarráð leggur áherðslu á, at farleiðin um Leirvík verður við í lógini um fast samband um Leirvíksfjørð og vísir á uppskot III 8 hjá Landsverkfrøðinginum frá mars 2001, har tunnil verður gjørdur undir Leirvíkar bygd.

Øll viðurskifti, ið viðvíkja ferðslu um Leirvík, skulu vera greið, áðrenn farið verður undir gerð av føstum sambandi um Leirvíksfjørð, og alt arbeiði í samband við ferðsluna um Leirvík skal verða liðugt, tá ið undirsjóartunnilin verður tikin í nýtslu.






